# Jónas skoraði í Íslandi

**FÓTBÓLTUR** Føroyski landsliðsspælarin pyntaði um støðuna fyri Val, sum tapti 2-1 á útivølli ímóti Fylkir

Uni Holm Johannesen

Føroysku spælararnir í íslendskum fótbólti fingu einki burturúr, tá ið Valur í kvøld spældi grannauppgerðá útivølli ímóti Fylkir.

Jónas Þór Næs, Pól Jóhannes Justinussen og Christian R. Mouritsen vóru allir millum teir fyrstu ellivu hjá Vali. Í hálvleikinum var 1-0 til Fylkir. Christian R. Mouritsen kom ikki á vøllin eftir steðgin, og tíggju minuttir eftir hvíldina varð Pól Jóhannes Justinussen skiftur út.

Tjúgu minuttir undan leikloki økti Fylkir um leiðsluna, og tað var ikki fyrrenn í evstu løtu, at Valur minkaði um munin til 2-1, sum eisini gjørdist endaliga úrslitið. Málskjútti hjá Vali var Jónas Þór Næs, sum spældi allan dystin á tamb. Valur hevur seks stig fyri fýra dystir.

Føroysku spælararnir og liðfelagarnir løgdu bragdliga fyri við tveimum sigrum, men síðani hava teir tapt tvær ferðir.

*uni@sosialurin.fo*

# Ståle Solbakken til Köln

**FÓTBÓLTUR** Venjarin hjá FC København, Ståle Solbakken, skal næsta kappingarár venja týska Bundesliga-felagið FC Köln. Tað bleiv kunngjørt í dag

Uni Holm Johannesen

Avgerðin ber í sær, at Ståle Solbakken verður ikki norskur landsliðsvenjari næsta ár, hóast hann og norska fótbóltssambandið gjørdu eina avtalu um tað í november í 2009. Nú tann avtalan er farin fyri bakka, hava fótbóltssambandið og FC Köln tingast um eina hóskandi samsýning.

Ståle Solbakken hevur verið venjari hjá FC København síðani 2006 og hevur fingið sera góð úrslit við felagnum. Frammanundan var hann venjari hjá norska felagnum Ham-Kam.

*uni@sosialurin.fo*




*Savnsmynd*

# Jákup Suni er sterkastur

**FÓTBÓLTUR** Jákup Suni Berg vann fýra av seks kappingum í høllini á Hálsi í gjár, og hann vann heitið sum føroya sterkasti maður

Uni Holm Johannesen

Seinnapartin í gjár fóru átta føroyingar at stríðast um heiðurin at vera føroya sterkasti maður. Tá var árliga føroyameistarakappingin. Har vóru átta vøddamiklir menn í harðari kapping, tí hvør teirra bar, lyfti og hildu væl yvir eitt tons, áðrenn tað var greitt, hvør var sterkastur.

Jákup Suni Berg vann kappingina. Hann stóð best best í bólkunum bonkpress, at lyfta bobbens og at renna við loddum upp gjøgnum trappur. Hann vann eisini stammuna.

Tað var Heini Hátun, sum vann í conanwheel. Bogi Hammer og Heini Hátún vunnu báðir í bólkunum deadlift, sum er at lyfta dekk.

## Royndir og óroyndir

Tað vóru bæði royndir og óroyndir menn, sum bjóðaðu seg fram at vinna føroyameistarakappingina í ár. Herman M. Hermansen og Bárður Poulsen hava drúgvir royndir. Bogi Hammer, Jákup Suni Berg og Finnur Poulsen vóru við í fjør. Heini Hátún, Johnfinn Hentze og Bjarni Joensen vóru nýggir í hesum hópi.

Gunnar Grækarisson, sum vann í fjør, hevði ikki møguleika at verja heitið í ár, men hann var við sum høvuðsdómari. Gunnar Hjelm var hjálpardómari.

Tað var eingin, sum stóð Jákup Suna Berg kurl. Hann vann við 44,5 stigum, sum er 7,5 stig fleiri enn nærmasti kappingarneytin, Jónfinn Hentze.

## Samlaða støðan í kappingini:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | Jákup Suni Berg | 44,5 stig |
| 2. | Jónfinn Hentze | 37,0 stig |
| 3. | Heini Hátún | 36,0 stig |
| 4. | Bogi Hammer | 32,5 stig |
| 5. | Herman M. Hermansen | 21,5 stig |
| 6. | Bárður Poulsen | 18,5 stig |
| 7. | Finnur Poulsen | 16,0 stig |
| 8. | Bjarni Joensen | 7 stig |